MENTAMÁLARÁÐIÐ

FÓLKASKÚLIN

FØROYSKT
9. FLOKKUR

Mánadagin 26. mai 2014
kl. 10.15 - 13.45

Loyvdir hjálparmiðlar: Orðabøkur

1 Barnið

- Greina og tulka myndina "Barnið"
  At lýsa huglagið í myndini skal vera partur av tíni greining og tulking.
- Hvørji tabuevni eru kanska fjald í myndini?
- Hvørja søgu heldur tú myndina siga?

Heiðrik á Heygum: "Barnið," 2012 – vatnlitir á pappír.

Tabuevni:
Evni, ið tað er bannað (ella forboðið) at nevna.
(sprotin.fo)

2 Besta prógvið í landinum

- Greið í stuttum frá, hvat greinin er um.
- Hvussu er blaðgreinin skipað (bygnaður)?
- Greið frá samskiftinum (tað er sendari, miðil og móttakari)
- Hvønn týdning hevur tað at klára seg væl í skúlanum? Grundgev.

- Eg geri mær ómak við øllum innlatingum og satsi altíð upp á toppkarakterir. Og so royni eg at sita fremst í flokkinum, tí tá fær mann mest við. Tað sigur 19 ára gamli Sigmundur Hannesarson úr Havn. Av øllum teimum mongu miðnámsnæmingunum, sum hava fingið prógv seinastu vikurnar, hevur hann besta prógvið við einum miðaltali á 10,9.

Rannvá G. Fossaberg
Sosialurin - 3. juli 2013

- Eg plagi at fáa millum 10 og 13 í øllum lærugreinum. Tað er bara í føroyskum, at eg ikki klári meg so væl. Har havi eg onkuntíð fingið eitt 9-tal.
Soleiðis sigur Sigmundur Hannesarson, sum fyri nøkrum døgum síðani fekk prógv sum støddfrøðiligur studentur. Eins og allar aðrar pisur gongur hann í hesum døgum errin runt við húgvuni, ið signalerar, at hann hevur gjøgnumført miðnámsútbúgvingina. Hann kann tó loyva sær at vera eitt vet meira errin enn øll hini. Sigmundur Hannesarson hevur besta prógvið í ár.
- Øll spyrja, hvør uppskriftin er at fáa eitt so gott prógv. Eg kann ikki svara annað enn tað vanliga, mann plagar at hoyra frá øðrum, sum hava fingið høgar karakterir. Eg geri nógv við skúlan, sigur Sigmundur Hannesarson lítillátin.

Hevur verið strævið

Herfyri var Sigmundur Hannesarson til sína seinastu prótvøku á Studentaskúlanum í Hoydølum. Seinastu vikurnar hevur hann verið til fimm skrivligar og tríggjar munnligar prótvøkur, har úrslitið fyri tað mesta varð prótvalið 11 og 13. Soleiðis hava støðumetini eisini verið hesi trý árini, Sigmundur Hannesarson hevur gingið á støddfrøðiligu deild.
Hektiskar og strævnar. Soleiðis lýsir Sigmundur Hannesarson hesar seinastu vikurnar, hann hevur verið til prótvøkur.
- Eg havi ikki fingið nógvan svøvn. Onkrar dagar havi eg lisið líka til klokkan seks um morgunin, sovið ein tíma, og so til prótvøku, sigur Sigmundur Hannesarson, ið hevur fyrireikað seg væl til allar prótvøkurnar.
- Eg havi ikki fyrireikað meg eftir nøkrum ávísum leisti, men eg havi lisið øll evnini ígjøgnum og annars bara lisið, líka til eg havi havt eina kenslu av, at nú klári eg at svara øllum tí, sum lærarin og prótvdómarin nú einaferð kunnu finna upp á at spyrja um undir prótvøkuni, fortelur Sigmundur Hannesarson.
Umframt at lesa nógv sjálvur hevur hann eisini til tíðir sitið í bólki saman við floksfeløgum og fyrireikað seg.
- Tað hjálpir eisini nógv, haldi eg, tí tá kanst tú síggja eitt evni frá fleiri sjónarhornum, sigur Sigmundur Hannesarson.
Men vilja øll ikki vera í bólki saman við honum, tá tey vita, at hann altíð fær góðar karakterir?
- Jú, eg varð bjóðaður at vera við í fleiri bólkum, sigur Sigmundur Hannesarson spakuliga. Hann hevur á ongan hátt hug at reypa. Tvørturímóti.

Framløgan skal fyrireikast

Hvørja ferð Sigmundur Hannesarson hevur verið til prótvøku, hevur hann klárað seg væl. Sjálvur heldur hann, at fyrireikingartíðin, áðrenn tú skalt inn til sjálva prótvøkuna, hevur stóran týdning.
- Tá fyrireiki eg tað, sum eg ætli mær at leggja fram fyri læraranum og prótvdómaranum, og brúki

bara nakrar fáar minuttir upp á at lesa um evnið. Tað havi eg gjørt dagarnar frammanundan og veit, hvat tað snýr seg um, sigur Sigmundur Hannesarson og heldur fram:

- Ístaðin fyri at lesa plagi eg at ganga runt í fyrireikingarhølinum og leggja fram fyri mær sjálvum, sigur Sigmundur Hannesarson og hevur hug at flenna.

- Men eitt annað gott ráð í sambandi við prøvtøku er at brúka alla tíðina. Tað plagi eg at gera, og á tann hátt stýri eg í stóran mun sjálvur, hvat gongur fyri seg undir prøvtøkuni, sigur Sigmundur Hannesarson og nevnir ein annan fyrimun við at brúka alla tíðina inni í prøvtøkuhølinum.

- Á tann hátt er heldur ikki tíð til teir heilt nógvu spurningarnar frá lærara og prøvdómara. Onkrir spurningar koma sjálvandi altíð, men við at brúka alla tíðina til at leggja fram, avmarkar tú tíðina, har lærarin og prøvdómarin kunnu seta teir spurningar, sum tú kanska ikki dugir so væl at svara.

Ger sær ómak

Sigmundur Hannesarson heldur, at tað eru tvey ting, ið eru avgerandi fyri, at tú kanst fáa eitt gott prógv.

- Tað snýr seg fyrst og fremst um at gera nógv við skúlan gjøgnum alt árið. Sjálvur havi eg kanska ikki gjørt so nógv við tað vanliga heimaarbeiðið, men eg havi gjørt mær ómak við øllum innlatingum. Eitt nú tá eg havi skrivað ein stíl, so havi eg brúkt nógva tíð upp á at hyggja væl eftir øllum setningum og orðingum fyri at fáa hvønn einstaka setning at ljóða so væl, sum til ber, sigur Sigmundur Hannesarson.

Eisini lærararnir hava stóra ávirkan, heldur hann.

- Tað er ógvuliga týdningarmikið, hvussu lærarin leggur tíman til rættis. Hann skal duga at gera evnið áhugavert. Megnar hann tað, tímir tú automatiskt betri at fylgja við í undirvísingini. Eg havi sjálvur upplivað, at onkur lærugrein hevur verið ordiliga keðilig, og eingin í flokkinum hevur tímað at fylgt við í undirvísingini. Men tá vit so hava skift lærara, so hava øll knappliga hildið júst ta lærugreinina verið áhugaverda og hava gjørt nógv við at fyrireika seg og lisið uppá til hvønn undirvísingartíma, greiðir Sigmundur Hannesarson frá.

- Ofta er tað gott at sita fremst, tá undirvísing er. Tá fær mann mest við, og tað er einki, ið órógvar, sigur Sigmundur Hannesarson.

Hóast hann brúkar nógva tíð upp á skúlan, so sigur hann seg kortini ikki vera typan, sum bara situr inni og ger skúlating.

- Eg havi eisini eitt sosialt lív, og tað skal tað eisini vera tíð til. Eg plagi at sparka fótbólt, spæla telduspæl saman við vinmonnunum, og so gangi eg eisini eitt sindur í býnum, sigur Sigmundur Hannesarson og leggur skemtiliga afturat, at síðani húgvan kom á høvdið, hevur talið av býtúrum verið væl hægri enn vanligt.

Stjørnualisfrøði í Onglandi

Við einum miðaltali á 10,9 eru møguleikarnir fyri eini hægri útbúgving nógvir. Og Sigmundur Hannesarson veit longu, hvussu prógvið skal brúkast.

- Eg ætli mær at fara til Onglands at lesa stjørnualisfrøði. Mær hevur altíð dámað væl alisfrøði, og nú havi eg møguleika fyri at útbúgva meg innan tað, og tað gleði eg meg til, sigur Sigmundur Hannesarson.

Hann fer tó ikki á skúlabonk í Onglandi rættiliga enn, tí komandi tíðina vil hann vinna sær pening og síðani ferðast ymsastaðni.

- Planurin er, at eg arbeiði til einaferð næsta vár, og síðani fari eg at fjakka við vinfólki. Ætlanin er at koma víða, og tí verði eg noyddur at arbeiða frá nú av, og til vit fara avstað, sigur Sigmundur Hannesarson.

Hóast hann er vanur við toppkarakterir og hevur fleiri 13 tøl í prøvnum, veit hann eisini, hvussu tað er, tá tað gongst minni væl til eina prøvtøku.

- Einaferð var eg til skrivliga prøvtøku í støddfrøði og helt sjálvur, at tað gekk væl. Karakterurin bleiv tó alt annað enn góður, tí eg hevði gloymt at blaða um á ta einu síðuna og sostatt ikki roknað eina heila síðu. Men so havi eg roynt tað, sigur superstudenturin og flennir.

Teksturin er tillagaður

3 Gardinur

Greina og tulka stuttu stuttsøguna. Í tíni viðgerð skalt tú m.a:

- Lýsa Jónatan og foreldrini.
- Greiða frá sambandinum millum Jónatan og foreldrini.
- Greiða frá muninum millum dreingirnar báðar.
- Greiða frá boðskapinum í tekstinum.
- Meta um, hvussu tú heldur, tað fer at gangast Jónatani framyvir.

Ein drongur sat á rimaverkinum yvirav. Hann sat og sveiggjaði við beinunum. Jónatan sá ikki, um hann var ein, hann kendi. Drongurin sat bara har og sveiggjaði beinini aftur og fram, aftur og fram. Tað var ótrúliga nógv tíð, sum fór við tí. Aftur og fram. Av og á legði drongurin høvdið afturá og hugdi upp í bláloftið. So legði hann høvdið á skák, sum hann lurtaði. Tað mundi vera fuglunum, hann lurtaði eftir. Jónatan hoyrdi hvørki fuglar ella tónleik. Vindeygað var afturlatið, sjálvt um tað var heitt í kamarinum. Mamma helt tað vera best, um vindeygað var afturlatið, so hann betri fekk savnað seg. Tað var jú tað, at hann var so dugnaligur í skúlanum. Babba segði, at framtíðin hjá honum var tryggjað, um altso hann var íðin. Gløggskygni pliktar, segði babba. Jónatan hevði skift skúla. Nú var hann ikki longur hin dugnaligasti í flokkinum, men tað kundi hann aftur gerast, um hann var íðin. Allar møguleikar hevði hann, um hann kýtti seg, og tað gjørdi hann. Mamma og babba vóru sera errin av honum. Tey reypaðu av honum. Hann fekk eisini løn fyri at gera skúlatingini. Hann skuldi ikki ganga við bløðum og tílíkt. Hann var ikki sum hatta býtta yviri á rimaverkinum. Jónatan lurtaði. Nú var deyðakvirt. Hann fór á føtur, sera spakuliga, og hálaði so gardinurnar fyri.

Bent Haller úr savninum *"Børn á markinum" 2013*

Børn á markinum er savn við sera stuttum søgum. Hvør søga er ein løtumynd.



4 Hol í sálini

- Skriva eina krimisøgu við heitinum "Hol í sálini."

  Tú skalt lata tekstin verða byrjanina til søguna.

Hol í sálini
Ein ung genta verður funnin deyð, flótandi á einum lítlum vatni í Djúpadali.
Hon er nakin og pakkað inn í plast.
Onkur, sum kendi hana, hevur dripið hana.....

Til íblásturs:

Ein krimisøga hevur serlig eyðkenni:
- hendingarnar snúgva seg um eina **brotsgerð**, sum er ella verður framd.
- altíð onkur, ið fremur brotsgerðina - ein **brotsmaður.**
- sigur, hvussu brotsgerðin verður **avdúkað.**

Spenningur er sera umráðandi í krimisøguni.
Óvæntaður endi ger ikki søguna verri!

Hetjan er hin djarvi sneytarin ella løgreglumaðurin. Ella..... tann drongurin/gentan, ið avdúkar brotsverkið.

Góð ráð:
Brúka sansirnar.
Sig frá ljóðum, litum, luktum, kenslum og øðrum.